UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **19. november 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-45**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-077/2021 eftir § 52 a í Tingskipanini - frá Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Um fráveru hjá næmingum á miðnámi í sambandi við koronu.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Verða næmingar á miðnámi skrivaðir fyri fráveru í skúlanum, um teir eru heima, tí teir hava koronu?
2. Verða næmingar á miðnámi skrivaðir fyri fráveru, um teir skulu kanna seg fyri koronu í skúlatíðini?
3. Um ja, hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at frávera vegna koronu skal verða góðtikin frávera?
4. Hvussu metir landsstýrismaðurin, at tað ber til at halda koronutilmælini á miðnámsskúlunum?

Svar

Til 1: Miðnámsskúlarnir skipa sína fráveruskráseting eftir ásetingum í kunngerð nr. 5 frá 22. januar 2013 um lestrar- og skilhaldsreglur í gymnasialum miðnámsútbúgvingunum og sambært kunngerð nr. 83 frá 4. juni 2013 um felagsreglur í yrkisnámi, sum seinast broytt við kunngerð nr. 121 frá 19. juli 2019.

Eftir hesum ásetingum er tað hvør skúli sær, ið setur í verk reglur, herundir reglur fyri fráveruskráseting.

Meginreglan er, at skúlar skráseta alla fráveru og orsøkina til fráveruna, um næmingur hevur upplýst tað. Skúlin setur ikki agatiltøk í verk, uttan so, at frávera fer upp um rímiligt mark, og atlit verður í tí sambandi tikið til orsøkina, m.a. møguliga koronusmittu ella aðra sjúku.

Síðan korona byrjaði, hava miðnámsskúlarnir havt tað siðvenju, at fyri næmingar, ið eru heima vegna staðfest korona, ella eru settir í sóttarhald, skipa skúlarnir tilboð um undirvísing umvegis ein talgildan samskiftismiðil, samstundis sum vanliga undirvísingin er. Tað mest vanliga er at

brúka Microsoft Teams. Harumframt verða næmingar leypandi kunnaðir um framtøkuna í undirvísing, ið ger tað møguligt fyri næmingin at fylgja undirvísingini. Sostatt hevur næmingurin ikki verið fráverandi frá undirvísing, hóast hann hevur verið heima vegna smittu, ella orsakað av sóttarhaldi vegna samband við smittaðan. Loyvi til talgilda undirvísing skal veitast umvegis leiðslu og/ ella lestrarvegleiðing, og verður loyvi bert givið, um dokumentatión uppá smittu ella sóttarhald er.

Er tað so, at næmingur vegna koronusmittu ikki er nóg birgur at fylgja undirvísing á t.d. Teams, verður hetta skrásett sum frávera.

Kravd skrivlig avrik skulu latast inn rættstundis í øllum skúlum, hóast koronusmittu ella sóttarhald. Næmingar kunnu í ávísum førum fáa nýggja innlatingarfreist, um næmingurin ikki megnar síni skrivlig avrik vegna sjúkuna.

Sjúkraundirvísing kann verða sett í verk, um frávera vegna sjúku væntandi er longri enn 15 dagar. Í førum, har hetta er neyðugt, skipar skúlin hetta í samstarvi við einstaka næmingin.

Til 2: Næmingar, ið lata seg kanna fyri koronusmittu í skúlatíð, verða skrivaðir fyri fráveru, men í einstøkum førum, tá smitta hevur havt størri útbrot við sær, tá eru heilir flokkar sendir til kanningar, og undirvísingin flutt, ella tikin inn aftur seinni.

Til 3: Sum ávíst í svari til 1, so er meginreglan, at skúlar skráseta alla fráveru og orsøkina til fráveruna, um næmingur hevur upplýst tað. Skúlin setur ikki agatiltøk í verk, uttan so, at frávera fer upp um rímiligt mark, og atlit verður í tí sambandi tikið til orsøkina, m.a. møguliga koronusmittu ella aðra sjúku.

Eg havi ongar ætlanir um at gera broytingar hesum viðvíkjandi.

Til 4: Koronutilmælini eru broytt nakrar ferðir, og nú er tað hvør einstakur skúli, í samstarvi við landslæknan og heilsufakliga bólkin, sum tekur støðu til tiltøk í sambandi við smittufyribyrging, tá ið smitta er. Skúlarnir eru ógvuliga ymiskir, og tað kunnu vera avbjóðingar eitt nú við at halda tilmæli um fjarstøðu, tí hølisviðurskiftini eru so ymisk. Samanumtikið er tað tó mín fatan, at skúlarnar, í tí stóra og heila, hava megnað væl at halda tilmælini frá myndugleikunum.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður